# Úttøkuskipan til NM/NJM 2025

Starvsnevnd SSF hevur samtykt fylgjandi kravtíðarskipan til Norðurlendsku Meistarastevnuna og JuniorMeistarastevnuna sum verður í Reykjavík í Íslandi frá 28. til 30. november 2025.

Uppá tal eru tey av hesum sum í kravtíðarskeiðnum klára avrik yvir ásettu AQUA-stig (2024) á stuttgeil (25m):

- Yngri juniorar (født í 2010-2012): 625 AQUA-stig
- Eldri juniorar (fødd í 2008-2009): 650 AQUA-stig
- Seniorar (fødd í 2007 ella fyrr): 675 AQUA-stig

Sí AQUA 2024 talvurnar her:

- Kvinnur: World-Aquatics-Points-SCM_2024_Female-.pdf
- Menn: World-Aquatics-Points-SCM_2024_Male-.pdf

Starvsnevndin tilskilar sær rætt at taka út eyka svimjarar, sum lýst í úttøkuskipanini til eyka úttøkur:

https://ssf.fo/kapping/uttokuskipan-til-eyka-uttokur/

Starvsnevndin tilskilar sær hartil rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. sep. 2025, og at velja luttøku frá um serligar umstøður tala fyri hesum.

Kravtíðarskeiðið er frá og við 1. sep. 2024 til og við 9. nov. 2025 (FMS/JMS 2025)

Sí annars "Reglugerð um úttøku og kravtíðir":
http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Feløgini verða biðin um at fráboða Svimjisambandinum um teir svimjarar ið hava klárað kravtíð, við tilskilan av grein og tíð, umframt nær og hvar tíðin varð svomin.

Feløgini verða hartil biðin um at fráboða Svimjisambandinum um teir viðkomandi svimjarar ið *ikki* ynskja úttøku, í seinasta lagi tá ið FM á stuttgeil 2025 byrjar.

Viðkomandi landslið verður úttikið sum skjótast aftaná at kravtíðarskeiðið er runnið.

Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum.

Við svimjikvøðu

Starvsnevnd SSF

ATLANTIC AIRWAYS